

*Ætlanin er at byggja upp í skúlan vestureftir, har hondbóltsvøllurin er í dag* **Mynd: Edvard Joensen**

# Fleiri útbyggingar á Eiði

*Eiðis Kommuna hevur fleiri stórarbeiði á skránni í løtuni. Farið er undir at fylla út fyri landingarmiðstøð. Grivið er út fyri skúlaútbygging. Og el- telefon- og vatnveitingarnar verða lagdar av nýggjum um alla gomlu bygdina*

EDVARD JOENSEN

Landingarmiðstøð verður bygd á Eiði í næstum. Eiðis Kommuna er farin undir at gera økið til støðina klárt. Fylt verður út í havnarlagnum, har nýggja landingarmiðstøðin skal standa.

Hans Jákup í Kollsbyrgi, bygdarráðsformaður, sigur, at talan er um eitt projekt, sum fer at kosta einar tvær milliónir krónur, tá høllin stendur liðug.

Hildið varð ikki, at pláss var fyri einum nýggjum bygningi á gamla havnarlagnum, og tí varð avgjørt at fylla økið út í havnina. Talan hevði annars verið um at seta høllina á øðrum stað á havnarlagnum, men mett varð, at tað fór at verða til bága fyri annað virksemi, sum er á staðnum. Sum er heldur fiskivinnan til í vestara parti av havnini, meðan eystari partur er ídnaðarøki.

Hóast tað er Eiðis Kommuna, sum fer at eiga høllina, verður tað eitt felag, sum er undir stovnan, sum skal reka sjálva støðina. Tað er nevniliga ikki loyvt kommununi at seta pening beinleiðis í vinnuna, sigur bygdarráðsformaðurin á Eiði. Sum skilst eru tað eiðismenn, sum standa aftan fyri felagið, sum skal reka landingarmiðstøðina. Hetta felagið fer so at leiga hølini frá kommununi.

Hans Jákup í Kollsbyrgi, bygdarráðsformaður, sigur, at ætlanin er at taka í móti og skilja fisk á staðnum, áðrenn hann verður sendur til virkini, sum keypa. Høllin verður gjørd av betongelementum, sum eru umbiðin frá Elementvirkinum við Gjógv, sigur Hans Jákup í Kollsbyrgi.

Annars er eisini onnur útbygging í gongd á havnarlagnum. Smiðjan hjá partafelagnum Hydro Tech, er vorðin ov lítil og skal byggjast út. Har verður gjørd ymisk útgerð til alivinnuna.

Okkurt til vatnorkuútbyggingina hjá SEV við Eiðisvatn. Og ikki at gloyma katamaranarnar, sum teir gera til alibrúkini. So nógv stendur á, at teir um dagarnar fingu tveir skrokkar, sum smíðaðir eru eystanfyri, til at gera lidnar.

Umframt er eisini brævbjálvavirki Tonito nýliga flutt í nýggj høli á økinum.

### Eisini skúlaútbygging

Eiðis Kommuna hevur fleiri jørn í eldinum í løtuni. Grivið er út fyri skúlaútbygging. Ætlanin er at byggja upp í skúlan vestureftir, har hondbóltsvøllurin er í dag, greiðir bygdarráðsformaðurin frá. Grivið er út, og tilfarið til bygginguna er umbiðið.

Byggiætlanin fevnir um nakrar serstovur, sum sambært skúlalógini skulu gerast. Sum er, er skúlin ov lítil, og onkur serstova er tikin til vanliga undirvísing, sigur Hans Jákup í Kollsbyrgi. Tí er byggingin neyðug.

Umframt verður farið undir eina ítróttarhøll, sum bygd verður upp í skúlan. Talan er um eina høll, sum stendur mát til ein atljóða góðkendan hondbóltsvøll við áskoðaraplássum, greiðir bygdarráðsformaðurin á Eiði frá.

Talan er um eina byggiætlan upp á einar átta - níggju milliónir krónur, sigur Hans Jákup í Kollsbyrgi, bygdarráðsformaður.

Kommunan fíggjar alt virksemið sjálv, sigur hann. Almenna íløguætlanin fyri kommunurnar loyvir nevniliga ikki lántøku. Men av tí, at Eiðis Kommuna er rímiliga væl fyri fíggjarliga, fer tað at bera til, væntar bygdarráðsformaðurin.

### Nýggjar leiðingar

Eisini aðrastaðni á Eiði verður grivið og lagt aftur um dagarnar. Túnini eru grivin upp og leiðingar av ymsum sløgum lagdar av nýggjum.

Hans Jákup í Kollsbyrgi, bygdarráðsformaður, sigur, at allar vatnleiðingarnar í gomlu bygdini trongdu til at verða skiftar út. Hesi gomlu rørini kláraðu ikki meira, sigur hann. Men hann metir, at nýggju útstykkingarnar eru so mikið væl fyri, at tað fer ikki at verða neyðugt at gera nakað har í bræði.

Samstundis, sum grivið varð fyri vatnleiðing, varð samstarv fingið við SEV og Føroya Tele um eisini at leggja teirra leiðingar av nýggjum.

SEV tekur gomlu luftlinjurnar niður og leggur jørðkaðalar um alla bygdina. Mett varð skilagott at gera hetta arbeiðið nú í vetur, tí um summarið verður nógv arbeitt í haganum og á fjøllunum. Arbeiði, sum av góðum grundum er torført at gera á vetrardegi. Eisini Føroya Tele leggur nýggjar kaðalar um bygdina, nú grivið er kortini. Og umframt alt hetta, verða eisini lagdar leiðingar til kaðalsjónvarp. Ella í hvussu so er rør, sum kaðal so seinni kann dragast ígjøgnum, um tørvur verður á tí, sigur Hans Jákup í Kollsbyrgi.

Og tað dámar honum væl, tí so ber til at sleppa undan øllum hesum parabolantennunum, sum eru at síggja allastaðni, sigur hann.

Um aðrar ætlanir, kommunan hevur, sigur Hans Jákup í Kollsbyrgi, at helst verður farið undir at hampa um økið rundan um lítla vatnið niðan fyri bygdina. Hetta er framhald av arbeiði, sum fyrr er gjørt við eitt nú gøtum rundan um vatnið og tílíkum.

Eiði varð í fjør útnevnd best hildna bygd í Føroyum 1999. Og tað er nakað at liva upp til.




*Eiðis Kommuna er farin undir at gera økið klárt til landingarmiðstøð*
**Mynd: Edvard Joensen**






*Risastóri norki verksmiðjutrolarin, American Empress kemur undir føroyskt flagg innan ein mánað. Talan verður um nógv tað størsta fiskiskipið í føroyska flotanum*

# American Empress kemur fyrst í februar

*American Empress kemur undir føroyskt flagg fyrst í februar. Hetta vátta bæði Aker RGI og JFK Trol. Partarnir vóru saman í gjár á Langsten-skipasmiðjuni*

JÓGVAN HUGO GARDAR, OSLO

Partarnir hava ikki skrivað undir eina endaliga avtalu enn, men bæði Aker RGI og JFK Trol vátta, at nú er næstan komið á mál.

American Empress kemur undir føroyskt flagg, og tað verður JFK Trol sum skal leiga trolaran. Aker RGI verður ikki við í felagnum, sum skal reka trolaran.

Hanus Hansen, stjóri, var í gjár staddur á Langstenskipasmiðjuni í Noregi saman við íløgustjóranum í Aker RGI. Hann sigur, at nú er avtalan at kalla í havn, og eftir ætlan kemur American Empress til Føroyar fyrst í februar — ella ikki seinni enn hálvan februar.

Íløgustjórin í Røkke-felagnum Aker RGI, Frank Reite, sigur, at hetta er ein sera spennandi ætlan, sum JFK Trol ætlar sær í gongd við.

– Um hendan royndin eydnast, so kann hetta skapa nógv arbeiðspláss í Føroyum. American Empress er vælegnaður til hendan fiskiskapin, sigur Frank Reite. Hann váttar, at trolarin kann sigast at vera á veg undir føroyskt flagg.

– Vit hava ikki skrivað undir nakra endaliga avtalu, men trolarin liggur nú á skipasmiðju í Noregi, har hann verður gjørdur klárur til at fara undir tann fiskiskapin, sum JFK Trol ynskir at brúka hann til — nevnliga at framleiða svartkjaft til matna.

# Tjóðveldisflokkurin kravdi frágreiðing

*Á samgongufundinum í gjár kravdi Tjóðveldisflokkurin at fáa at vita, hví handfaring landsstýrissins av pensjónsmálinum hevur verið so vánalig*

JOHN JOHANNESSEN

Í gjár klokkan eitt seinnapartin var samgongufundur í Tinganesi, um arbeiðslagið í samgonguni. Talan var um ein samgongufund, løgmaður tók stig til eftir nógvar og harðar atfinningar frá samgongutinglimum móti arbeiðshátti landsstýrissins.

Sum Sosialurin skilti á Tjóðveldisflokkinum fyrrapartin í gár, fór flokkurin at krevja frágreiðing frá landsstýrinum um, hví pensjónsmálið varð handfarið, sum tað bleiv.

Høgni Hoydal, varaløgmaður, vísti á, at neyðugt er fáa staðfest, hvat er hent í umsitingini hjá Almanna- og Heilsumálastýrinum, tá uppskotið um pensjónslógina varð fyrireikað. Hetta heldur Tjóðveldisflokkurin vera ógvuliga umráðandi, tí gølan um pensjónsmálið minkar um trúvirðið hjá politisku skipanini, verður greiða ikki fingin á málinum.

Varaløgmaðurin sigur ongan iva vera um, at pensjónsmálið er handfarið skeivt. Málið rakar jú inntøkuna hjá hvørjum einstakum pensjónisti, og tí áttu pensjónistar at verðið væl og virðiliga kunnaðir um nýggju pensjónslógina somuleiðis, sum hædd átti at verið tikin fyri skattaviðurskiftunum, tá pensjónslógin varð gjørd.

Greiða skuldi á samgongufundinum í gjár finna greiðu á hesum málinum og politikkinum annars. Samgongan skuldi finna eina loysn á samstarvstrupulleikunum, so slíkar gølur ikki stinga seg upp aftur.

Høgni Hoydal, varaløgmaður, sigur, at hann metir ein part av trupulleikunum botna í, at munurin millum flokkarnar í samgonguni er so stórur. Tí metir hann tað vera týdningarmikið við neyvum samstarvi og regluligum samgongufundum.

